Bjarni Djurholm:

# – Mugu hyggja eftir alternativum flogvølli

**Í næstum verður frágreiðing latin landsstýrinum um útbygging av flogvøllinum í Vágum og uppskot um, hvussu haldast skal fram við at kanna møguleikarnar fyri alternativum flogvølli.**

FLOGVØLLIR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri sigur, at tað liggur í kortunum, tá Vinnumálaráðið í næstum fer at mæla løgmanni til at taka upp samskifti við forsætisráðharran um flogvøllin í Vágum, at man eisini fer at vísa á, hvat skal gerast frameftir tvs. uppá longri sikt. Tann parturin, sum fevnir um útbygging av verandi flogvølli verður vantandi avgreitt í landsstýrinum í juni mánað. Næsti parturin at taka upp verður so spurningurin um ein alternativan flogvøll.

Nú tað hevur verið frammi oftani, at tørvur er á einum alternativum flogvølli í Føroyum spurdu vit Bjarna Djurholm, landsstýrismann, hvør hansara egna meting er í hesum máli.

– Taka vit Hetland, so eru har fýra flogvøllir, og tað er helst ásannandi teirra veðurviðurskiftum. Og við tí gongd í Føroyum, har vit hava sett okkum fyri at vera millum fremstu lond í 2015, er tað ikki meira enn sjálvsagt, at vit eisini kanna alternativar flogvøllir.

Landsstýrið hevur fingið eina fyribils frágreiðing, sum sigur, at tað er møguligt at gera flogvøll á Glyvursnesi uppá 1800 metrar. Tað sama í Søltuvík, meðan man er ivasamur um Skorðhæddina. Men henda kanningin er ikki endalig og fær landsstýrismaðurin eina av komandi vikunum eina niðurstøðu um hesi viðurskiftini. – Eg kann bert siga, at allir møguleikar eru opnir.

Bjarni Djurholm ger greitt, at eitt nú vágafólk, sum kanska síggja flogvøllin í Vágum hóttan, tá tosað verður um nýggjan flogvøll, hava onga orsøk til at bera ótta. –Vit síggja fyri okkum, at økist flúgvingin í Føroyum og vit innan fyri eitt 10 ára skeið ella longuri hava brúk fyri einum øðrum flogvølli, so hava vit ikki brúk fyri einum men fyri báðum flogvøllum. Her eru tað ikki minst veðurviðurskiftini, sum spæla inn, og tí skal hædd verða tikin fyri teimum, tá vit fara undir at tosa um ein alternativan flogvøll.

Vinnumálaráðið er annars í gongd við at gera avtalu við ES um, at vit gerast partur av ECAA avtaluni, sum merkir, at flúgving til og úr Føroyum verður at meta javnt við flúgving í Europa, og tað merkir, at útlendsk feløg kunnu flúgva til Føroyar uttan nakað serstakt loyvi. Tey skulu bara lúka tær flogteknisku treytirnar, sum eru. Tað merkir so eisini, at eitt nú Atlantsflog kann flúgva frítt í Europa. Tað fer at seta stór krøv til Atlantsflog men so sanniliga eisini geva Atlantsflog og somuleiðis nýggja felagnum FaroeJet møguleikar.



Mynd av Bjarna

*Bjarni Djurholm heldur framtíðin fer at seta krøv til tveir flogvøllir*

# Útgávukonsert við Mariu Guttesen í Miðlahúsinum



*Maria Guttesen*

Í samband við at fløgan Maria Guttesen: LIVE kemur út týsdagin 16. mei, verður skipað fyri útgávu konsert við Mariu Guttesen í Miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn. Seinasta hálva árið hevur Maria havt fleiri konsertir í Danmark við nýggjum tónleikatilfarið. Í mars mánað hevði hon tvær upptøkukonsertir í Salon í Århus, og tað eru løg av hesum framførslum, ið nú verða útgivnar á fløgu, ið rætt og slætt kallast Maria Guttsen: LIVE.

Maria Guttesen er ein av evnaríkastu føroysku tónleikarkvinnum yvirhøvur, og tí kann áhoyrarin vænta sær eina áhugaverda, og til tíðir, spontana konsert.

Konsertin verður í Miðlahúsinum týskvøldið 16. mei klokkan 20.00

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 20 2006

# Partabrøv lækkaði nógv í farnu viku

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku lækkaðu partabrøv nógv. Norrøna vísitalið lækkaði 5,5%. Størsta fallinum stóðu oljufyritøkurnar Statoil og Norsk Hydro fyri, við eini lækking á ávíkavist 10% og 11%. Á danska keypsskálanum lækkaði Vestas 9,3%, meðan onnur sterk feløg sum Danske Bank og GN Store eisini fingu av at vita. Síðan ársskiftið eru partabrøvini í norðurlondum hóast seinastu lækkingina hækkaði heili 7%. Støðugt hækkandi olju- og rávørurprísir hava í seinastuni økt óttan fyri, at trýstið á prísvøkstin fer at økjast. Størri prísvøkstur vil føra til hægri rentu, sum aftur vil tyngja um kapitalkostnaðin hjá virkjum. At partabrøv lækka aftaná eina sera skjóta hækking er vanligt. Íleggjarar nýta soleiðis høvi til at staðfesta nakað av vinningi. Grundleggjandi er tó einki broytt í búskaparviðurskiftunum og bjørtu langtíðarútlitini hjá partabrævaíleggjarum eru óbroytt. Lækkingin seinastu dagarnar er eitt gott høvi til at ogna sær partabrøv bíligari.

### Lánsbrøv standa enn í stað

Lánsbrævarenturnar hava aftur verið friðarligar hesa farnu vikuna. Danska 10-ára rentan hevur sveiggjað millum 4,05%-4,15%. Vit hava í 3 vikur væntað, hon fór at lækka eitt sindur. Nú eru greiðari tekin um, at ein lækking endiliga nærkast.

### Stjórnin bjartskygd um Volvo

Volvo hevði eitt tiltak fyri íleggjarunum 10. mai, og har kom fram, at stjórnin nú er væl bjartskygdari um gongdina í 2006 og 2007, enn hon var áður. Orsøkirnar eru fleiri. Millum annað er eftirspurningurin í Evropa og USA hægri enn væntað, søluprísirnir eru hægri, og sparingar verða framdar fyrr enn væntað.

### Hesa vikuna

Seinastu vikuna hevur ótti fyri prísvøkstri fingið takið á fíggjarmarknaðunum. Hetta fer væntandi framvegis at verða umráðandi hesa vikuna. Tøl fyri amerikanska prísvøksturin vera á breddanum, umframt oljuprísurin og dollarakursurin.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 582,54 | -0,7% | ↓ |
| JPY | 5,27 | 0,3% | ↑ |
| GBP | 1.094,97 | 0,4% | ↑ |
| NOK | 95,69 | -0,1% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,45 | -0,2% |
| | | |
| Norrøn Partabrøv | 117,06 | -4,1% |
| | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*